HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Sigurð Ó. Vang, stjóri
Eirargarður 2
100 Tórshavn

10. februar 2011
Mál: 10/00611-23
Tygara skriv:
Viðgjørt: KG/IN

**Heilivágsráð**

Við hesum verður boðað frá, at í sambandi við at ein nýggj játtan er stovnað á Løgtingsins fíggjarlóg 2011 um dýran sjúkrahúsheilivág (nevnd 11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur), hevur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður, gjørt av at seta eitt Heilivágsráð (uppgávurnar og heimildirnar hjá Heilivágsráðnum verða nærri lýstar niðanfyri).

Aksel V. Johannesen hevur valt tygum sum lim í Heilivágsráðið.

**Manning**
Landsstýrismaðurin hevur gjørt av, at Heilivágsráðið verður mannað við hesum seks persónunum:

- Stjórin á Landssjúkrahúsinum – Jóanis Erik Køtlum*
- Varastjóri á Landssjúkrahúsinum (lækni) – Tummas í Garði
- Depilslæknin á medisinska deplinum – Bjarni á Steig
- Landsapotekarin – Hjalti Gunnarstein
- Sjúkrahúsfarmaseuturin á Tjaldurs Apoteki – Ingun Hansen
- Heilsumálaráðið – Irena Nolsø

* Tann 1. mars 2011 tekur Sigurð Ó. Vang við starvinum sum stjóri á Landssjúkrahúsinum. Av somu orsøk fær hann sætið í Heilivágsráðnum, og fer Jóanis Erik Køtlum samstundis úr Heilivágsráðnum.

Stjórin á Landssjúkrahúsinum er formaður í Heilivágsráðnum.

Tá ið Heilivágsráðið er mannað við fólki við læknafakligum- og heilivágsfakligum serkunnleika umframt fólki frá stjórnarráðnum, kann væntast, at málini verða viðgjørd nágreiniliga, bæði heilsufakliga og fyrisitingarliga. Allir limir í Heilivágsráðnum hava ábyrgd av, at málini verða lýst til fulnar, og at dentur verður lagdur á saklig fyrilit undir málsviðgerðini.

**Kunning um uppgávur og heimildir hjá Heilivágsráðnum**
Í tí niðanfyristandandi er ein yvirskipað kunning um uppgávurnar og heimildirnar hjá Heilivágsráðnum. Við støði í hesum, verður Heilivágsráðið at gera nágreiniligar mannagongdir innanfyri virkisøkið sum heild hjá Heilivágsráðnum.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: hmr@hmr.fo

Landsstýrismaðurin hevur gjørt av at seta eitt Heilivágsráð, sum skal stýra gongdini og hava eftirlit við nýtsluni av dýrum sjúkrahúsheilivági. Heilivágsráðið verður mannað við fakfólkum innan sjúkrahúsverkið, heilivágsøkið og fyrisitingina. Landsstýrismaðurin ásetur tær yvirskipaðu politisku raðfestingarnar, sum Heilivágsráðið skal virka undir, umframt reglur um avgerðarheimild og virksemi hjá ráðnum.

***Uppgávur og heimild***
Uppgávurnar hjá Heilivágsráðnum verða tvíbýttar, og snúgva tær seg í høvuðsheitum um, at:

1. Ráðgeva landsstýrismanninum og áseta leiðreglur um nýtsluna av dýrum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum
2. Hava eftirlit við nýtsluni av dýrum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum

*Til 1: Ráðgeva landsstýrismanninum og áseta leiðreglur um nýtsluna av dýrum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum.*
Undir galdandi skipan gera yvirlæknarnir í sjúkrahúsverkinum sjálvir av, hvørji sløg av dýrum sjúkrahúsheilivági teir skriva út (ordinera) til sjúklingar. Til tess at kunna stýra hesum øki, er tað neyðugt, at ein nýggj mannagongd verður sett í verk hesum viðvíkjandi.

Henda mannagongd skal bæði fevna um dýran sjúkrahúsheilivág, sum longu verður nýttur og í sambandi við støðutakan til nýggjan og dýran sjúkrahúsheilivág. Landsstýrismaðurin hevur gjørt av, at fylgjandi mannagongd verður nýtt í sambandi við støðutakan um, hvørji sløg av dýrum sjúkrahúsheilivági yvirlæknarnir kunnu skriva út.

Mannagongdin er býtt í tveir partar:

a) Galdandi heilivágssløg
   - Fyrsti partur snýr seg um, hvør mannagongd skal nýtast í sambandi við galdandi sløg av dýrum sjúkrahúsheilivági.

b) Nýggj heilivágssløg og broyting í viðgerðum til sjúklingabólkar
   - Annar partur snýr seg um, hvør mannagongd skal nýtast, áðrenn nýggj, dýr sløg av sjúkrahúsheilivági kunnu takast í nýtslu; og harumframt hvør mannagongd skal nýtast, áðrenn broytingar í viðgerðarháttinum hjá sjúklingabólkum verða framdar, sum hava við sær, at dýrur sjúkrahúsheilivágur verður skrivaður út til aðrar sjúklingabólkar, enn upprunaliga ætlað.

*Til a: Galdandi heilivágssløg*
Heilivágsráðið skal gera tilmæli um, hvørji sløg av dýrum sjúkrahúsheilivági yvirlæknarnir kunnu skriva út til teir ymsu sjúklingabólkarnar. Tilmæli verður orðað við støði í innstillingum frá yvirlæknum, rekommandatiónslistum og viðgerðarvegleiðingum hjá Rådet for Anvendelse af Dyr Sygehusmedicin (RADS). Tilmæli frá Heilivágsráðnum skal bæði verða grundað á heilsufaklig atlit og taka atlit til fíggjarligar avleiðingar av at taka tey ymsu sløgini av dýrum sjúkrahúsheilivági í nýtslu.

Heilivágsráðið sendir tilmæli til landsstýrismannin í heilsumálum til støðutakan. Landsstýrismaðurin skal góðkenna tilmæli, áðrenn tað kann verða sett í gildi.

Tá landsstýrismaðurin hevur góðkent tilmælini, boðar hann Heilivágsráðnum frá støðutakan síni. Eftir hetta ger Heilivágsráðið leiðreglur um tey sløgini av dýrum sjúkrahúsheilivági, sum

yvirlæknar kunnu nýta í sambandi við sjúklingaviðgerð hjá teimum ymsu sjúklingabólkunum, og fráboðar yvirlæknunum hetta. Yvirlæknarnir skulu fylgja teimum leiðreglum, sum Heilivágsráðið ásetur.

Listin yvir heilivág, sum yvirlæknarnir kunnu skriva út sambært leiðreglunum, verður skrásettur í heilivágsskápinum í Cosmic, soleiðis at bert yvirlæknar á sjúkrahúsinum hava møguleika fyri at fyriskipa henda heilivág.

*Til b: Nýggj heilivágssløg og broyting í viðgerðum til sjúklingabólkar*
Av tí, at tað javnan koma nýggj sløg av heilivági á marknaðin, verður støðugt tørvur á at dagføra listan í heilivágsskápinum. Í slíkum førum verður mannagongdin henda, tá støða skal takast til, um heilivágur, sum ikki stendur á listanum, møguliga skal koma á henda lista.

Tá ein yvirlækni heldur, at heilivágur, sum ikki er á listanum yvir dýran sjúkrahúsheilivág, eigur at koma á henda lista, skal viðkomandi yvirlækni venda sær til Heilivágsráðið hesum viðvíkjandi. Heilivágsráðið tekur síðani støðu til, um ynski hjá yvirlæknanum skal gangast á møti ella ikki.

Um Heilivágsráðið tekur undir við yvirlæknanum, ger Heilivágsráðið eitt tilmæli, sum verður sent til landsstýrismannin til støðutakan (í slíkum førum verður sama mannagongd nýtt, sum tá talan er um galdandi heilivágssløg).

Heilivágsráðið skal gera tilmæli til landsstýrismannin, áðrenn nýggj heilivágssløg verða tikin í nýtslu í sjúkrahúsverkinum, sum væntandi fara at fáa stóra ávirkan á útreiðslugongdina á økinum. Hetta kann t.d. vera í teimum førum, tá talan er um dýran heilivág, ella tá mongdirnar verða so stórar, at tað hevur við sær ein ógvusligan útreiðsluvøkstur.

Áðrenn ein yvirlækni kann seta í viðgerð sjúkling ella sjúklingabólk, sum hevur við sær stórar útreiðslur til heilivág, skal Heilivágsráðið hava játtað hesum.

Um ein yvirlækni ynskir at viðgera ein sjúklingabólk við øðrum sløgum av dýrum sjúkrahúsheilivági, enn Heilivágsráðið hevur givið tilsøgn um, skal yvirlæknin søkja Heilivágsráðið um loyvi at broyta viðgerðarhátt fyri sjúklingabólkin, áðrenn hetta kann verða gjørt. Heilivágsráðið skal loyva hesum, áðrenn viðgerðarhátturin kann broytast.

*Einstaklingamál vs. sjúklingabólkar*
Heilivágsráðið skal taka støðu til viðgerð við dýrum sjúkrahúsheilivági til sjúklingabólkar og ikki taka støðu í einstaklingamálum.

*Til 2: Hava eftirlit við nýtsluni av dýrum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum*
Onnur uppgávan hjá Heilivágsráðnum er at tryggja, at heilivágsnýtslan í sjúkrahúsverkinum er í samsvari við leiðreglurnar, og at játtanin á fíggjarlógini verður hildin út frá teimum politisku málsetningunum, sum landsstýrismaðurin setir.

Hetta merkir ítøkiliga, at Heilivágsráðið skal fylgja við nýtsluni á játtanini til serliga dýran sjúkrahúsheilivág og heita á landsstýrismannin um politiska avgerð, um tørvur verður mettur á tí.

Tað er sera týdningarmikið, at tað verður ein skipað kunning frá Heilivágsráðnum til Heilsumálaráðið um gongdina á økinum viðvíkjandi dýrum sjúkrahúsheilivági. Av somu orsøk skal Heilivágsráðið senda Heilsumálaráðnum slíka kunning mánaðarliga saman við framskrivingum av væntaðu gongdini restina av fíggjarárinum.

Heilivágsráðið skal somuleiðis meta um fíggjarligar avleiðingar, og um tað er neyðugt við eini eykajáttan, áðrenn tilboð um nýggjar viðgerðir verður veitt.

Yvirlæknar skulu senda Heilivágsráðnum kunning mánaðarliga um, hvussu nógvir sjúklingar eru í teimum ymsu viðgerðunum við heilivágssløgunum, sum eru fevnd av leiðreglunum um dýran sjúkrahúsheilivág. Tá yvirlæknar seta sjúklingar í viðgerð við heilivági, sum er á listanum hjá Heilivágsráðnum yvir dýran sjúkrahúsheilivág, skulu teir senda Heilivágsráðnum eina kunning hesum viðvíkjandi.

Apoteksverkið skal lata Heilivágsráðnum hagtøl, sum skulu nýtast í arbeiðinum við at hava eftirlit við nýtsluni av dýrum sjúkrahúsheilivági.

Ein early-warning skipan frá yvirlæknum til Heilivágsráðið skal skipast og setast í verk.

**Heilivágsskáp**
Ein fortreyt fyri, at skipanin við einum heilivágsskápi kann virka sambært ætlan, er, at listin yvir heilivágssløg støðugt verður dagførdur. Skipanin við einum heilivágsskápi í Cosmic-skipanini krevur eisini, at allir læknar, sum ávísa heilivág til sjúklingar á sjúkrahúsinum skulu brúka Cosmic. Á henda hátt verður eisini tryggjað, at einans heilivágur, sum er skrásettur í heilivágsskápinum, verður nýttur.

Vinaliga

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

Poul Geert Hansen
aðalstjóri